The King



Johan Mortensen
skrivar



Savnsmynd

> *Í dag kann hvør Hanus og Janus útflyta fisk sum honum lystir. Allur flatfiskurin fer óvi›gjørdur av landinum og nógvur annar fiskur vi› honum. Slíkt kann ein bananrepublik loyva sær men ikki framkomna landi› Føroyar. Ta› er óhoyrt at útflyta óvirka›a rávøru.*

Vi› øllum lítillatni, so havi eg hei›urin av at vera tann fyrsti, sum útflutti føroyskan aldan laks.

Hetta var fyri alibrúki› SALMO í Kaldbak, stovna› av sló›brótaranum og undangongumanninum Guttormi Djurhuus. Hetta var sera spennandi roynd. Um sama mundi› fiska›u vit nógvan villan laks nor›an fyri Føroyar og spurningurin var, um ta› yvirhøvur var markna›ur fyri aldum laksi, og um hann kundi kappast vi› villa bró›ur sín.

Okkara keyparar lótu væl at laksinum úr Kaldbak. Gó›skan var sera gó›, og eg minnist, at vit fingu umlei› Kr 75,- fyri kg! Sí›an byrja›i regluligur útflutningur av aldum laksi og ein n‡ggj føroysk vinna sá dagsins ljós.

Those were the days og restin er søga í dag:

Vit hava ikki veitt villan laks í skjótt 10 ár og tíanverri bendir alt á, at hesin laksur, THE KING OF FISHES, sum hann var› róptur, hevur í dag risa stórar trupulleikar orsaka› av ovurvei›u, dálking og av árininum av ótálma›ari aling. Har›ar atfinningar eru í dag móti teim londum, sum ótalma›i vei›a villan laks og eiga vit at hugsa okkum sera væl um, á›renn vit fara undir hesa vei›u aftur.

Tey 10 kg av fyrsta alda laksinum, sum vóru send úr Kaldbak á altjó›a markna›in, hava í dag ment seg til ein føroyskan útflutning, sum skjótt kemur uppá 50.000 tons og nærkast 1 Mia Kr í útflutningsvir›i.

Ta› er ein sannroynd, at alingin er í dag ein sera t‡dningarmikil og kærkomin faktorur í Føroyska búskapinum og hevur hon stóran t‡dning í hesum døgum, har tosa› ver›ur um ein sjálvberandi búskap. Tó er vandi í hvørjari vælfer› og er alingin heldur ikki l‡taleys.

Alingin dálkar í størri og minni mun. Kanningar fara fram í løtuni, sum fara at sta›festa, hvussu stór henda dálking er í veruleikanum. Ta› ver›ur ofta ført fram, at vi› at ala uttanfyri fir›irnar ger henda dálking ikki so nógv. Hetta er skeivur hugbur›ur. Havi› er eittans, og dálkingin hvørvur ikki til havs. Mørk eru fyri, hvussu nógv vit ósnikka› kunnu lata fara út í havi›. Ta› er at harmast um, at Heilsufrø›isliga Starvsstovan hevur so líti› av peningi á figgjarlógini, at eftirliti› er langt frá nøktandi. Ta› er ósømuligt, at umhvørvi› er so ni›urprioritera›. Umhvørvi› sum er ogn alra Føroyinga.

Ta› er at fegnast um, at tey seinastu árini hava roynst væl fíggjarliga hjá alvinnuni.Tá ein í rokniskapunum sær tann vinning, sum alararnir hava, er ikki órímuligt at halda, at eini 2 % av útflutningsvir›inum áttu at ver›i løgd í ein í grunn sum td., kanna›i árini› á náttúruna, bøtti um ska›ilig árin og menti søluarbei›i›. Ein slíkur grunnur hev›i skjótt havt eitt mundandi stovnsfæ. Heldur ikki er órímuligt, at alingin var› áløgd ein sokalla›an ”grønan” skatt fyri leigu av umhvørvinum. Ein Grønur Rokniskapur eigur at ver›a eitt ófrávikiligt lógarkrav. Ein so vælkonsolidera› vinna sum alivinnan hevur rá› og skyldu til at vísa samfelagssinni.

Ta› er sera harmiligt, at vit í ár hava fingi› hervuligu laksasjúkuna inn á okkum. Hetta átti alivinnan at hava veri› nógv betur fyrireika› uppá og ma., havt mundandi neyvari eftirlit vi›, hvussu laksur ver›ur tikin og førdur bygdanna millum og gjørt meira fyri at vart seg fyri møguligum smittuvanda frá vandaøkjum í grannalondunum. Eisini átti alivinnan fyri langari tí› sí›an sett á stovn og sjálv fíggja› sína egnu djóralæknatænastu og kanningarstovu. Hetta er líka so nógv ein uppgáva hjá alingini sum hjá okkara myndugleikum.

Ta› er nógvir fremmandur kapitalur í føroysku alivinnuni. Umhvørviskrøvini í td. Danmark og Noregi eru munandi strangari enn í Føroyum og vóni eg ikki, at ta› er okkara manglandi umhvørviseftirlit, sum virkar dragandi á henda kapital.

Laksur var á›ur exclusivur matur. Tú fekk tær laks, tá ta› skuldi vera ”fínt”, sum tiki› ver›ur til. Og hví, jú laksurin smakka›i væl, hann var í serklassa, ein uppliving, sum ikki var hvøndagskostur.

Ta› er synd at siga, at vit gera naka› í dag á hesum bógvi. Aldi laksurin er tíanverri komin á sama stø›i sum hópframleiddir høsnarungar. Ein vøra, sum líti› og onki kostar, men sum tú heldur ikki setur nøkur krøv til, hvørki gastronomiskt ella hvat vi›víkur fø›sluinnihaldi. Hetta er harmuligt og sum naka› má gerast vi›.

Vit hoyra ongantí›, at føroyskur laksur fær rós frá altjó›a kokkum ella luttekur í matvørukappingum sum td., øll okkara grannalond gera. Sama skili› er yvirhøvur vi› ø›rum fiskaútflutningi okkara. Ta› s‡nist ikki sum, at vit hugsa um okkum sum ein matvøruframlei›ara, men heldur sum ein hópframlei›ara.

Einafer› var hugtaki› FAROESE FISH altjó›a kent.

Solei›is er ta› tíanverri ikki í dag. Okkara markna›arføring er ov tilvildarlig og ov líti› samansjó›a› og ver›ur alt ov lítil orka og peningur n‡ttur til hetta t‡dningarmikla arbei›i. Eg vil tó rósa Menningarstovuni og Kjartan Kristiansen fyri ta› stóra og sló›brótandi arbei›i tey leggja úr hondum vi› at fyriskipa føroyska luttøku á altjó›a fiskivinnuframs‡ningum.

Bert spell, at í dag kann hvør Hanus og Janus útflyta fisk sum honum lystir. Allir flatfiskurin fer óvi›gjørdur av landinum og nógvur annar fiskur vi› honum. Slíkt kann ein bananrepublik loyva sær men ikki framkomna landi› Føroyar. Ta› er óhoyrt at útflyta óvirka›a rávøru.

Ta› eigur at ver›a forbo› fyri at útflyta óvi›gjørdan fisk. Ta› átti ikki at veri› meira enn einir 15 lógarheimi›la›ir, gó›kendir fiskaútflytarar. Hetta er ikki at monopolisera eina vinnu, men heldur at stramma upp og tryggja, at optimalt fæst fyri okkara fiskavørur, krúnjúvelar og arvasilvur Føroya! Vit hava gó›kendar gransko›arar, var ta› so heilt óhugsandi at krevja gó›kendar fiskaseljarar?

Vi› skili ber til at verja náttúruna og samstundis hava eina bur›adygga ali- og fiskivinnu st‡rda av fíggjarligum parametrum. Ein ódálka› náttúra er munagott og kanska besta søluargument vit hava.

Fiskivinnan saman vi› Vinnumálast‡rinum eiga at seta á stovn eitt Gastronomiskt Institutt at nøra og menna føroyskar fiskaúrdráttir burturi sum heima. Vit hava gó›ar rávørur, og ta› ber til at gera nógv meira burtur úr teimum. Hugaligt ver›ur at síggja, hvussu LIDO SEAFOOD í Skálavík fer at klára seg. Eisini áhugaverdar eru ætlaninar hjá SANDOY SEAFOOD og L†SIVIRKINUM í Lorvík um at gera meira burturúr slógvinum. Hesi virki nevna, at vit í dag bert gagnn‡ta umlei› 33 % av okkara fiski !

Ta› er tankavekjandi, at fiskivinnutjó›in og fer›amannalandi› Føroyar ikki hevur eina einastu fiskamatstovu.

Eitt føroyskt skip var á royndarvei›u eftir villum laksi fyrr í ár. Eg var so heppin at fáa onkran av hesum laksum. Ta› var nærmast ein opinbáring aftur at síggja ein villan laks vi› litspælinum í ro›sluni, vi› fja›runum og stertinum óskala›um, tí ljósarey›a fiskinum og, mest av øllum, tann ótrúgligi vælsmakkurin av hesum villa laksinum, Kongur Fiskanna. Føroyskur fiskur hevur ein vælsmakk, sum tú sjáldan fær a›rasta›ni. Hetta er tann upplivingin sum bæ›i fer›ama›urin og tann kræsni forbrúkarin á meginlandinum vil hava og fegin vil gjalda fyri. Nevnast kann, at hesin villi laksur var› seldur fyri uml., Kr 80,- per kg í me›al, me›an aldur laksur um somu tí› fór fyri einar Kr 28,-.

Markna›urin fyri vistfrø›iligar ”grønar” vørur er í risastórum vøkstri og eru ta› markna›ir, sum uttan at blunka gjalda sera gó›ar prísir fyri hesar vørur.

Ta› eru stórir møgulleikar hjá føroyskari fiskivinnu vi› at n‡ta okkara náttúru og villini høv í markn›arføringini. Tess vegna er ta› so t‡dningarmiki› at bæ›i alivinnan, vinnur á landi og hvør einstakur av okkum ger sítt til at minka um dálking og at kenna ábyrgd fyri hesum vælsigna›a landi.

Men tó freistast ein onkuntí› at hava syndigar tankar um hvussu okkara ungfólk skulu tíma at arbei›a vi› fiski og markna›arføring av n‡ggjum framlei›slum, tá tey kunnu lata KAUPTHING arbei›a fyri seg og ómakaleyst gera tey til millióningar uppá eitt vikuskifti, eg meini ta› !

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

Fyrireika seg til Italia og Ongland

HB og KÍ eiga flestu spælararnar á u–17 landsliðnum, sum fer til Týskalands í komandi viku



Jón Rói Jacobsen er ein teirra, sum nú skal royna seg á U-17 liðnum

Tann síðsta mánaðin hava europeisku fótbóltsstjørnurnar kappast um EM, og tær hava verið at sæð á sjónvarpsskugganum. Í oktober skal føroyska u– 18 landsliðið taka lut í EM undankapping. Tann kappingin verður í Italia, og mótstøðuliðini hjá føroyska liðnum vera komandi landsliðsstjørnurnar hjá Italia og Onglandi, umframt at pinkutjóðin Andorra eisini verður á skránni.

At spæla móti sovornum tjóðum er ikki sum at siga tað hjá Føroyum. Tað vita teir væl í FSF, og tí verður ikki so lítið lagt í at fyrireika føroysku unglingarnar so væl, sum tað ber til. Føroyska liðið og venjarin, Jógvan Martin Olsen, hava vant heima á landi, og í komandi viku skal liðið taka lut í einari kapping í Týskalandi. Talan er um altjóða kapping í sambandi við at týska fótbóltssambandið í ár hátíðarheldur eitt hundrað ára stovningardagin.

Tíverri fyri Jógvan Martin Olsen og hansara menn, so ber ikki til at fara við øllum spælarunum til Týskalands, sum ætlanin er at brúka í heyst. Aldursmarkið í Týskalandi er soleiðis, at talan er um eitt u–17 landslið. Í heyst er ætlanin at brúka umleið sama liðið, sum fyri tveimum árum síðani spældi í NM kappingini fyri u–16 landslið í Gundadali. Tá tað ikki ber til at fáa teir við, sum eru føddir í 1982, hevur venjarin í staðin valt – umframt 1983 árgangin – at taka nakrar frá 1984 árganginum við til Týskalands.

Teir sekstan spælararnir, sum eru úttiknir, eru Pól Næs Joensen úr B36 og Gutti Harryson úr HB, sum eru málverjar. Útileikararnir eru Kristian á Lakjuni, Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør og Símun Joensen úr KÌ, Vagnur Mohr Mortensen, Bárður Christiansen, Bjarni Jørgensen og Jón Rói Jacobsen úr HB, Jann Ingi Petersen úr B68, Elfinn Ørvarodd úr FS Vágum, Fróði Jóanesarson og Áki L. Hansen úr NSÍ, Hanus Eliasen úr ÍF og Gilli Haraldsen úr Frederikshavn.

Tað sæst, at HB og KÍ eiga tilsaman níggju av teimum sekstan spælarunum. Og tað er eisini merkisvert, at fleiri av spælarunum longu eru at síggja í 1. deild. Jón Rói og Vagnur hava verið á besta HB liðnum, Kristian, Hjalgrím og Símun hava verið á liðnum hjá KÍ, og Jann Ingi hevur, hóast hann framvegis hevur aldur at spæla í dreingjadeildini, verið á besta liðnum hjá B68.

Millum tey nøvnini, sum ivaleyst verða á u–18 listanum í heyst, men sum eru ov gamlir at taka lut í kappingini í Týskalandi, kunnu nevnast málverjin Karstin Joensen og Rógvi Laksáfoss úr KÍ, Brynjolvur Nielsen og Bergur Djurhuus úr NSÍ, Niels Joensen og Ragnar Poulsen úr B36, Jack Johansen úr FS Vágum og Atli Gregersen av Bornholm.

– Eg havi mett, at u–18 árgangurin er sera spennandi. Tá tað ikki ber til at brúka eldra partin av honum í kappingini í Týskalandi, so havi eg valt at taka nakrar úr einum yngri árgangi við, sigur Jógvan Martin Olsen. Føroyska ferðalagið fer av landinum komandi mánadag, og teir vera aftur í Føroyum 8. juli.

Tað er ikki heilt greitt enn, hvørji mótstøðuliðini hjá føroysku unglingunum vera. Talan er ikki um kapping millum landslið, og tí er navnið á føroyska liðnum Atlantic. Í FSF hava tey fingið boð um, at mótstøðuliðini koma úr Turkalandi, Skotlandi og Týskalandi. Tveir dystir vera á skránni hvønn dag, og tað verður spælt tvær ferðir ein hálvan tíma. Tvey lið fara víðari úr hvørjum bólkinum, og í endaspælinum verður talan um cup kapping.

JH

Súni til Noregs

Í summar skal ungi gøtumaðurin, Súni Olsen, royna seg í tvær vikur hjá Kongsvinger

Í summar skal Súni Olsen royna seg hjá norska Rosenborg

Mynd: Álvur Haraldsen

Jákup Mørk

Eftir at GÍ í summar hevur verið á venjingarlegu í Danmark, fer meginparturion av leikarahópinum heim aftur til Føroya, har fyrireikingarnar til seinnu helvt av kappingarárinum halda á fram.

Til Rosenborg

Súni Olsen, sum er ein av yngru monnunum á GÍ liðnum, verður tó ikki viði liðfeløgunum á Føroyaferðini.

Hann fer hinvegin til Noregs, har hann frá 22. juli skal royndarvenja við fremsta norska fótbóltsfelagnum, Roesenborg.

Tað er Jákup í Stórustovu, sum stendur fyri venjingarferðini hjá Súna, og er hetta liður í eini verkætlan, sum hevur strekt seg yvir eitt longri tíðarskeið.

Frammanundan hava fleiri aðrir ungir føroyingar verið hjá ymsum útlendskum feløgum, men hetta er so fyrsta ferðin, at nakar teirra fer til Rosenborg.

Spentur

Sjálvur sigur Súni, at hann hevur vita av ferðini seinastu tveir til tríggjar mánaðirnar, og at hann sjálvsagt er spentur at sleppa at royna seg hjá norska felagnum.

Júst hvat úrslitið av ferðini verður, dugir hann tó als ikki at meta um, men kortini er hann sjálvandi sera spentir at fara.

Hóast talan er um eina sonevnda royndarvenjing, so hevur Jákup í Stórustovu alla tíðina lagt dent á, at talan fyrst og fremst skal vera um eina læruríka uppliving hjá ungu leikarunum.

Fyri at leikararnir kunnu fáa sum mest burturúr, er sjálvandi umráðandi, at teir eisini sleppa at royna seg í dysti, og her skilst á lagnum, at føroysku feløgini hava verið sera lagalig við at læna spæliloyvi hjá leikarunum út.

Venjingarskeiðið hjá Súna byrjar annars 22. juli, og skal hann so venja við felagnum fram til 31. juli. Tá fer hann við U-19 liðnum hjá Rosenborg til fótbóltskapping í Danmark, áðrenn hann at enda stevnir aftur móti Føroyum, ein dag undan GÍ setir hol á heystarskrá sína.

Sum nevnt, so er venjingarferðin hjá Súna liður í einum arbeiði, sum Jákup í Stórustovu í samstarvi við nakrar føroyskar fyritøkur hevur staðið fyri. Fyritøkurnar, sum hava stuðlað hesum, eru Føroya Shell, Tryggingarfelagið Føroyar og Føroya Sparikassi.

Upprunaliga vórðu fleiri ungir evnaríkir leikarar valdir út, og nú hava so flestu teirra roynt á egnum kroppi, hvussu tilveran hjá einum yrkisleikara er.

Einasti leikarin av teimum upprunaligu, sum enn hevur til góðar at fara á fótbóltsferð, er ungi HB framherjin, Jón Rói Jacobsen. Enn er ikki endaliga avgjørt, nær hann skal út at royna seg, men í samráð við HB og við atliti til strævnu dystarskránna, er í fyrstu atløgu gjørt av, at hetta ikki verður fyrr enn eftir kappingarárslok.

All-Inter Runavík

Fólk søkist at reka krambúð okkara í Runavík.

Vit vænta at tú ert sjálvstøðug/ur umframt at tú ert virkin í ítrótti.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

All-Inter
Postboks 350
700 Klaksvík